## Alina Olaru til Tjaldrið

Alina Olaru fer komandi kappingarár at spæla hondbólt við Tjaldrinum, eftir at hava verið í Klaksvík í nøkur ár. Í tíðindaskrivi, sum Tjaldrið sendi leygardagin, verður sagt, at sáttmáli er skrivaður við spælaran, sum seinnu árini hevur verið ein tann fremsta í føroysku kvinnudeildini. Tjaldrið spælir í 1. deild komandi kappingarár, men málið hjá felagnum er at koma upp í SunSet-kappingina. Og fyri at røkka hesum málsetningi hevur felagið nú styrkt seg við Alinu Olaru.

## Týskur landsliðsleikari til Real Madrid

Tað hevur leingi verið greitt, at Christoph Metzelder ikki fór at leingja sáttmála sín við Dortmund. Og sum gitingar hava verið um seinastu tíðina, fer týski landsliðsverjuleikarin til spanska Real Madrid. Hetta váttaði venjarin hjá Dortmund, Thomas Doll, fyri týskum sjónvarpi í leygardagin. 26 ára gamli Christoph Metzelder hevur leikt í Dortmund síðan 2000, har hann frá lítla týska felagnum, Preussen Münster.

# 13 heimsmeistarar til Føroya

**Fimm spælarar frá Champions League vinnarunum, Milan, eru við á Føroya-ferðini hjá Italia. Teirra millum tvífaldi málskjúttin, Filippo Inzaghi**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast nøvn sum Nesta, Toni og Totti ikki standa á listanum, sum italska fótbóltssambandið hevur latið UEFA undan Føroya-ferðini, so er talan kortini um eina ríkiliga stóra uppgávu hjá føroyska landsliðnum.

Frá hópinum, sum seinasta summar var við til at tryggja sær HM, eru 13 spælarar, og tað í sjálvum sær borgar væl fyri einum ávísum kvaliteti. Og teir, sum síðani eru komnir afturat, eru nú heldur ikki vánaligir spælarar. Snøgt sagt, so er talan um sanna stjørnukavalkadu, sum kemur hendanvegin, har lið sum Real Madrid, Barcelona, Inter, Milan og Roma standa á visit-kortunum hjá spælarunum. Teir trettan heimsmeistaranir eru Amelia, Buffon, Barzagli, Cannavaro, Materazzi, Oddo, Zambrotta, De Rossi, Gattuos, Perotta, Pirlo, Del Piero og Inzaghi.:



*Alessandro Del Piero er við 27 landsliðsmálum tann spælarin hjá Italia, sum oftast hevur skorað á landsliðnum. Í júst lidna kappingarári var hann toppskjútti hjá Juventus, sum eftir stóru gøluna aftur hevur vunnið seg upp í italsku seriu A*

*Mynd: Polfoto/AP*

### Italski hópurin

**Málverjar**

| Spælari | Felag | Landsdystir/mál |
|---|---|---|
| Marco Amelia | Livorno | 3/0 |
| Gianlugi Buffon | Juventus | 73/0 |
| Christian Abbiati | Torino | 4/0 |
| **Verjuspælarar** | | |
| Andrea Barzagli | Palermo | 13/0 |
| Fabio Cannavaro | Real Madrid | 106/1 |
| Marco Materazzi | Inter | 36/2 |
| Massimo Oddo | Milan | 26/1 |
| Gianluca Zambrotta | Barcelona | 63/2 |
| Allessando Gamberini | Fiorentina | 0/0 |
| Manuel Pasqual | Firorentina | 2/0 |
| Max Tonetto | Roma | 0/0 |
| **Miðvøllur** | | |
| Daniele De Rossi | Roma | 26/4 |
| Stefona Aimo Diana | Palermo | 12/0 |
| Gennaro Ivan Gattuso | Milan | 51/1 |
| Simone Perrotta | Roma | 34/2 |
| Andrea Pirlo | Milan | 36/5 |
| Massimo Ambrosini | Milan | 23/0 |
| **Álop** | | |
| Cristiano Lucarelli | Livorno | 3/1 |
| Antonio Di Natale | Udinese | 9/2 |
| Tommaso Rocchi | Lazio | 3/0 |
| Alessandro Del Piero | Juventus | 81/27 |
| Filippo Inzaghi | Milan | 53/23 |
| Fabio Quagliarella | Sampdoria | 1/0 |

## Skotsku skjúttarnir burtur

Tveir av vandamestu skotsku áleyparunum verða ikki við í hópinum, sum fer til Føroya. James McFadden, sum spælir við enska Everton, hevur tvær ferðir áður skorað móti Føroyum, men hann hevur brotið eitt bein í fótinum. Hartil fekk Kenny Miller ein vøddaskaða í lærarið, tá Celtic spældi steypafinalu.

Enn hevur skotski landsliðsvenjarin tó bert tikið Garry O'Connor út fyri McFadden.

- Vit hava longu mist McFadden, og tí er Kenny enn meira týdningarmikil hjá okkum. Hann hevur skotið nógv mál fyri Skotland og hevur ein sera sterkan vinnarahugburð, og vilja vit royna alt tað, vit eru mentir, fyri at fáa hann tøkan til dystin, sigur hjálparvenjarin hjá skotska landsliðnum, Roy Aitken, við skotska Daily Record.

Celtic-venjarin, Gordon Strachan, ivast tó í, um tað verður gjørligt hjá Miller at spæla.

- Eg meti ikki, at hann fær spælt. Talan er tíverri um ein rættiliga álvarsligan skaða, sigur Strachan við Daily Record.

Við Kris Boyd, Craig Beattie, Shaun Maloney og Gary O'Connor í hópinum hevur Alex McLeish tó framvegis fleiri streingir at spæla upp á í álopinum.

**-mørk**

# Claus vann á Wembley

**Blackpool skal komandi kappingarár spæla í enska Championship. Sunundagin vunnu teir 2-0 á Yeovil í play-off dysti**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

- Hetta er størsta upplivingin í mínum lívi. Heilt fantastiskt.

Soleiðis tók Claus Bech Jørgensen til við bold.dk, eftir at hann og Blackpool framman fyri 59.313 áskoðarum á Wembley høvdu bast Yeovil í dystinum um seinasta uppflytaraplássið til næst bestu ensku deildina.

Sigurin kom til høldar við málum frá Robbie Williams og Keigan Parker, sum skoraðu stutt fyri og stutt eftir steðgin. Talan var um tíggjunda sigurin á rað hjá Blackpool, og hetta er met í felagnum. Nakað sum avgjørt ikki gjørdi dagin verri. Og sum vera man skuldi hetta feirast á fýra tíma longu bussferðini heimaftur.

- Eg dugi slettis ikki at siga frá, hvussu hetta kennist. Tað er fyrsta ferðin, at eg eri fluttur upp við einum liði, og at tað skuldi henda á einum nærum fullsettum Wembley er bara heilt, heilt ótrúligt. Tað er eins og at síggja Chelsea, tá teir vunnu FA-Cup finaluna. Eg rokni í øllum førum ikki við, at gleðin hjá teimum var minsta pettið størri, enn hon var tað hjá okkum, sigur Claus við bold.dk.

Tá vit í farnu viku prátaðu við Claus undan dystinum á Wembley segði hann, at hann metti liðið hava møguleikan at standa seg í Championship, har Claus eisini áður hevur spælt.

- Sjálvandi verður málið fyrst og fremst at halda sessin í deildini, og til tess verður hópurin helst eisini styrktur. Hinvegin rokni eg við, at tað eru verri lið enn vit, sum áður eru flutt upp, so vit hava avgjørt møguleikan at bíta okkum fastar, segði hann.



*Claus Bech Jørgensen fekk sína nógv størstu fótbóltsuppliving nakrantíð, tá hann framman fyri nærum 60.000 áskoðarum var við til at vissa Blackpool uppflyting til næst bestu ensku deildina*

*Mynd: Polfoto/AP*